# Niels Winther aftur í Føroyum

**Niðanfyri prenta vit fyrilestur, sum Martin Næs, landsbókavørður, helt á Landsbókasavninum hóskvøldið, tá høggmyndin av Niels Winther var avdúkað og handa løgingsformanninum**

STANDMYND
*Martin Næs*



*Martin Næs, landsbókavørður, við høggmyndini av Niels Winther, stovnara av Færingetidende og fyrrverandiløgtings og fólkatingsmanni, sum Janus Kamband gjørdi í tríatiárunum. Myndin er handað løgtinginum og skal prýða nýumvældu tinghúsini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er torført, heilt greitt, at siga nær henda søgan byrjaði. Men tað er ið hvussu er ikki skeivt, um eg sigi, at hon onkursvegna byrjaði sama ár sum tann fyrsta føroyska bókin sá dagsins ljós, nevniliga í 1822, tá ið danin H.C.Lyngbye gav út kvæðasavnið "Færøiske Quæder". Henda bókin verður roknað sum fyrsta bókin, útgivin á føroyskum.

2. juli hetta sama árið - í 1822 - varð Niels Christopher Winther føddur.

Tað, sum Niels Winther í sínari tíð fekst við, var bók-mentir og politikkur.

Sigast má at bókmentirnar liva enn. Og framvegis er lív í politikkinum. Og í teimum samfeløgum, har peningur verður settur av til bókasøvn, har er eisini lív í bókasøvnunum.

Ein av uppgávunum hjá bókasøvnunum er at kunna um tilfarið, at gera bókalistar og framsýningar, at skipa fyri fyrilestrum, upplestrum o.ø. tiltøkum.

Fyri gott trimum árum síðan skipaðu vit, saman við øðrum, fyri - ja, kanska teirri størstu framsýningini, sum Landsbókasavnið nakrantíð hevur verið í holt við. Hetta var framsýningin "Heima á foldum" í sambandi við at 100 ár vóru liðin, síðan William Heinesen varð føddur.

Tveir dagar áðrenn framsýningin skuldi latast upp, legðist eg sjúkur við hervilligari krímsjúku, men tíbetur eru vit soleiðis fyri nú á døgum, at alt hongur ikki á einum persóni, soleiðis sum tað gjørdi fyrr í tíðini, vit eru fleiri og fleiri , íð manna garðin, og hetta kom so dyggiliga til sjóndar teir dagarnar fyri trimum árum síðan.

Men hví fara at roksa um sjúku beint nú. Jú, tí meðan eg lá har við nógvum hita, hita, sum eg als ikki hevði brúk fyri beint tá, ringdi telefonin sum vera man nógvar ferðir. Og ta einu ferðina eydnaðist tað ikki konuni at biðja mannin bíða til eg var komin uppaftur á højkant. Hann vildi hava orðið á meg beinanvegin.

Hetta var 16. januar 2000, sunnumorgun. Dagin eftir at allur býurin, alt landið hevði hátíðarhildið 100-ára dagin fyri Williami Heinesen.

Maðurin í telefonini var Mortan Winther Poulsen. At fyrispurningurin var av bókmentaligum slag, kann ikki burturforklárast, og í dag gott trý ár seinni, skilji eg væl, at Mortan ikki hevði stundir at bíða til bókasavnið læt upp morgunin eftir kl. 10. Hann fór beint til sakina, og segði seg vera staddan á blaðsíðu 59 í spildurnýggjari bók, sum kallaðist William ummælir fagrar listir, greinasavn eftir William Heinesen, sum Jóhannes Enni, sáli, hevði savnað og sum forlagið Fannir við Árna Dahl hevði givið út dagin fyri - eisini í sambandi við 100 ára dag Williams.

Har stendur, segði Mortan, í einum endurprentaðum ummæli, sum William Heinesen skrivaði á sumri í 1936, eitt ummæli av einari framsýning av listaverkum eftir Janus Kamban. Har stendur, at Janus Kamban eisini hevur gjørt eina standmynd av "skyldmanninum", einum røðara, einum klókum álvarsmanni - av tí fyrsta føroyska politikaranum og álvarsmanninum, Niels Winther.

Hvar er standmyndin?? veitst tú at siga mær tað??

Og áðrenn eg fekk mutla eitt svar fram úr hitanum, hevði Mortan lagt aftrat. Eg havi spurt Johan Hendrik bróðir, og eg havi spurt í Listaskálanum,og eg havi spurt hvønn Hanus og Janus, men nei, eingin veit, hvar hon er. Men so gjørdi eg ikki mætari, enn at eg ringdi beint til listamannin sjálvan......

Og sjálvt um eg við mínum 40 hitastigum royndi at steðga Mortani av, so helt hann bara fram:

....og Janus svaraði mær, áh, handa gipsmyndin, hon er úti á bókasavninum...... Veitst tú nakað um hana? spurdi Mortan í telefonini, og tað var heilt greitt, at hann hevði ikki stundir at bíða eftir svari, til fepurin hevði lagt seg.

Sjálvandi visti eg um eina gipsmynd, sum vit tá høvdu liggjandi úti í flaggrúmi-num, vit kalla, einum rúmi við síðuna av fýrrúminum, har vit m.a. goyma øll tey norðurlendsku fløggini - eisini tað fyrsta samiska flaggið, sum sanniliga eisini, so løgið tað ljóðar, kann setast í samband við Árna Dahl. Men ta søguna lati eg liggja hesaferð. - Harúti hevði gipsmyndin, íð hvussu er ligið síðan á heysti í 1994, tá ið tveir av sterkastu monnunum her á Debesartrøð komu berandi við henni oman úr gomlu bókasavnshúsunum, har hon hevði ligið í kjallaranum, eg veit ikki hvussu leingi.

Hesir sterku menninir søgdu við meg: hetta eiga tit, og so settu teir ein illa farnan yvirkroppin frá sær mitt í bilhúsinum og niður við høggmyndini settu teir eisini ein gulan fiskakassa fullan av leysum lutum, sum einaferð høvdu myndað hetta listaverkið í heild, og sum hevði verið sýnt fram á framsýning í Perluni á ólavsøku í 1936. Og hondina á hjartað, so var eg ikki heilt greiður yvir tá, hvønn standmyndin avmyndaði, og enn minni visti eg, hvør hevði gjørt listaverki. Men sum ein sannur bókasavnari, so takkaði eg fyri, og segði, at vit skuldu nokk ansa eftir, at hann fór at fáa tað gott, og at hann ikki kom verri til skaða, enn hann longu var komin.

- Hetta var um ta tíðini, tá ið Oljufyrisitingin flutti inn í gomlu bóka-savnshúsini.

Tað, sum eg eisini visti, men sum eg mitt í øllum feprinum, sjálvandi ikki segði fyri Mortani, var, at stutt áðrenn eg legðist við krímsjúkuni, hevði eg fingið fyrispurningin, um ikki hatta óruddið av eini brotnari standmynd kundi koyrast burtur, men sum tann treiski bókavørðurin eg eri, svaraði eg, nei tað mugu vit ikki gera, vit mugu heldur gera á okkurt annað.....

Og so fóru vit undir at gera nakað annað.....

Nakrar dagar seinni, tvs. í februar í 2000, ringdi eg til Mortan og segði honum, at nú kundu vit áseta fund úti á bókasavninum. Fundarevnið var Niels C. Winther. Á fundi møttu Mortan, eg, Asbjørn, húsavørður, og listamaðurin sjálvur, Janus Kamban.

Høggmyndin varð drigin fram úr flaggrúminum, og løgd á ein trækassa í bilhúsinum, sum eisini var fundarhølið. Vit høvdu breitt ein dúk yvir hana. Við síðuna av høggmyndini høvdu vit sett tann gula fiskakassan við leivdunum í.

Eg minnist sera væl orðini hjá Janusi Kamban, tá ið vit drógu dúkin oman av myndini.

Hann brosaði stillisliga. Túturin á kollinum fór eitt vet niður á pannuna, og tað reyða hálsturriklæði hevði mestsum hug at breiða seg yvir listaverkið.

"- Ja, gipsið var vánaligt tá í tíðini. Vánaligt tannlæknagips. Eg fekk tað frá Kaaber!"

Hetta vóru orðini. Stórt meira varð ikki sagt.

Og at tilfarið ikki var tað besta, váttar William Heinesen á øðrum stað í sama greinasavni, har hann tekur soleiðis til í grein til Janus Kamban á seksti ára føðingardegnum: "Onnur verk frá teirri tíðini eru tíbetur eftir, men bert fá eru tilevnað í haldgóðum tilfari, og summi eru tí farin fyri skeytið..."

(William ummælir fagrar listir, bls. 180).

Um fundin yvir gipsmyndini kann eg siga, at hetta var ein av teimum stuttu og góðu.

Niðurstøðan var greið. Nú skuldi Niels Winther ikki brotna aftur. Nú skuldi hann í bronsu.

Men fyrst mátti hann snikkast saman aftur.

Dagin eftir var gipsmynd og fiskakassi flutt yvir á verkstaðið hjá Janusi Kamban í Klokkaragøtu. Janus vildi fegin vita, um hann ikki kundi seta høggmyndina saman aftur, so væl sum tað nú lat seg gera.

- Men tit mugu koma at hjálpa mær, tá ið hann skal vendast, tí nú eri eg komin so mikið til árs, at tað klári eg ikki einsamallur.

Yviri í Klokkaragøtu hevur høggmyndin verið til í summar. Tá høvdu vit verið nakrar ferðir yviri hjá Janusi og vent Niels Winther, so hann vendi rætta vegin ímóti sólarljósinum. Janus fekk snikka listaverkið væl og virðiliga samanaftur. Og í heyst hevur Niels Winther so verið ein túr niðri í Keypmannahavn, og nú, áðrenn há-tíðarárið endar, er hann afturkomin, stoyptur í bronsu..

Vit eru sera fegin, um at tað loksins hevur eydnast okkum at fingið gjørt standmyndina úr haldgóðum tilfari.

Hetta er mynd av einum av okkara slóðbrótarum. Ein av okkara fyrstu politikarum og ein av okkara fyrstu rithøvundum, ein av okkara fáu veruligu merkismonnum. Ei undur í, at tað var bókmentamaðurin og politikarin, Mass Jacobsen, sum tíðliga í tríatiárunum eggjaði tí tá unga listamanninum Janusi Kamban at seta sær fyri at gera eina høggmynd av hesum slóðbrótara.

- Eg havi fleiri ferðir hesa tíðina hugsað við mær sjálvum: Hvat hevði hent, um Oljufyrisitingin ikki flutti inn í gomlu Bókasavnshúsini á sinni?! So hevði Niels Winther kanska ongantíð verið borin út!!

Eg fari undir øllum umstøðum at veita Árna Dahl, bókaútgevara, eina stóra tøkk fyri at hann tímir at fáast við føroyska bókaútgávu. Høvdu hann og Marianna ikki átikið sær at útgivið greinasavnið William ummælir fagrar listir, so hevði Mortan Winther Poulsen ivaleyst ikki rent seg inn í hatta ummælið hjá Williami Heinesen, og so hevði hann ongantíð havt ringt til mín handan forkølaða sunnumorgunin í januar í 2000 og sóknast eftir høggmyndini av skyldmanninum, og so høvdu vit heldur ikki endað í flagg-rúminum á Landsbókasavninum í teimum ørindunum. Eg takki tær Mortan fyri títt árvakni og fyri áhuga tín fyri skyldmanninum.

Men størstu tøkkina eigur listamaðurin sjálvur, sum í tolni hevur bíðað í næstan 70 ár, at síggja sítt ungdómsverk verða sett á heiðurspláss. Vit eru Janusi Kamban sera takksom fyri, at hann hevur hjálpt okkum øllum aftur á beint. Hjartaliga takk fyri og ein serlig tøkk fyri samstarvið hesi trý árini.

Seinast í umrødda ummæli, frá 1936, skrivar William Heinesen:

"tað hevði verið hóskandi, at løgtingið keypti Janusar Niels Winther-mynd; væl eru tíðirnar ringar, men ongantíð so ringar, at tað ikki loysir seg at veita einum ungum landsmanni ein dugnað og einum gomlum landsmanni og undangongumanni eitt sámiligt minni."

Í ár hátíðarhalda vit á ymiskan hátt, at Løgtingið varð endurreist fyri 150 árum síðan.

Á Landsbókasavninum hava vit fyrr í ár almannakunngjørt, at vit hava talgildað nøkur av okkara elstu tíðarritum, soleiðis at tey nú kunnu lesast á internetinum. Eitt av hesum tíðarritum er fyrsta blað føroyinga Færingetidende, sum Niels Winther gav út í 9 numrum í 1852.

Landsbókasavnið hevur boðið løgtingsformanninum at verið til staðar her í kvøld, tí vit hava, við samtykki listamansins, gjørt av at gera eftir tilmælinum hjá Williami Heinesen og geva Løgtinginum bronsumyndina av merkismanninum Niels Winther í teirri vón, at Løgtingið finnur listaverkinum eitt heiðurligt pláss í nýumbygdu tinghúsunum, og at vit á henda hátt seta "einum gomlum landsmanni og undangongumanni eitt sámiligt minni."

## 67 ára gomul høggmynd handað Løgtinginum

STANDMYND
*Eirikur Lindenskov*

Føroya Løgting og Føroya fyrsta blað, Færingetidende, hava tað til felags, at bæði vórðu til í 1852. Tá kom fyrsta føroyska blaðið út, og tá varð løgtingið endurstovnað.

Á samkomu á Landsbókasavninum hóskvøldið varð høggmynd av Niels Winther, sum stovnaði Færingetidende, avdúkað og handað løgtingsformanninum, Edmundi Joensen. Talan er um standmynd, sum Janus Kamban gjørdi úr gipsi í tríatiárunum. Hon hevur verið burturgoymd síðani. Herfyri fór Mortan Winther Poulsen í Havn at fregnast um hana - og nú er hon stoypt í bronsu og handað løgtinginum, so minnið um Niels Winther, fyrsta blaðmann føroyinga, løgtings- og fólkatingsmann – kann koma til heiður og æru í løgtinginum.

Janus Kamban, sum nú er 89 ára gamal, var til staðar á Landsbókasavninum – og hann var sera fegin um standmyndina.

Omanfyri greiðir Martin Næs, landsbókavørður, nærri frá um standmyndina.



*Janus Kamnan, myndahøggari, er nú 89 ára gamal. Hann var á Landsbókasavninum hóskvøldið, tá høggmyndin varð handa løgtingsformanninum*



·FØROYA·
SOCIAL·DEMOKRAT

Føroyskt myndahøggarakynstri.

*Í Sosialinum í september í 1935 William Heinesen ummældi ólavsøkuframsýning, sum verið hevði, har høggmyndin hjá Janusi Kamban eisini var við. William Heinesen var – saman við eitt nú Heðini Brú – fastur mentanarskrivari í Sosialinum í mong ár*